# Spakin settur í fyri nýggja skúlanum í Runavík

**Nýggi skúlin í Runavík skal eftir ætlan standa liðugur í 2008. Í gjár var hátíðarhald, í samband við, at Hans Jacob Lamhauge, borgarstjóri, setti fyrsta spakan í og sostatt byrjaði arbeiðið. - Hetta er eitt ódnartak fyri kommununa, segði Hans Jacob í røðu sínari**

SKÚLABYGGING
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Í gjár klokkan 15 varð skipað fyri móttøku í samband við, at arbeiðið við nýggja skúlanum í Runavík skuldi byrjað. Hans Jacob Lamhauge, borgarstjóri, setti fyrsta spakan í. Eftir hátíðarhaldið uttanfyri skúlan í Runavík, varð farið inn í skúlan, har ið kaffi og køkur vóru at fáa.

Einans fimm minuttir eftir, at fólkini vóru farin inn, byrjaði gravimaskinurnar at grava, og arbeiðið varð farið í gongd. Tað er Articon, sum stendur fyri arbeiðinum at gera nýggja skúlan.

Huglagið var gott ímillum fólk, og tey tóktust at vera væl nøgd við at fáa nýggjan skúla.

**Stór verkætlan**

Hans Jacob Lamhauge bar fram røðu uttanfyri skúlan:

– Mánadagur 2.oktober 2006 kemur at standa sum ein merkisdagur í skúlasøguni hjá Runavíkar kommunu, tí at vit í dag seta spakan í fyri størstu verkætlan í okkara kommunu nakrantíð. Ja, helst størstu einstaku verkætlan sum nøkur kommuna í Eysturoynni nakrantíð er farin undir. Ein skúlabygning sum verður 4.800 fermetrar til víddar, og sum kemur at kosta umleið 82 milliónir krónur.

Hetta er eitt ódnartak fyri kommununa, men vit hava ásannað, at karmarnir um verandi skúlaskipan ikki eru nøktandi, og heldur enn at gera ábøtur, so valdi kommunan at taka stigið fult út og byggja nýggjan skúla, sum kemur at lúka øll tey krøv, ið undirvísingarskipanin krevur, segði Hans Jacob millum annað.

Hann bar fram nøkur søgulig fakta og hugleiddi um ódnartøk, sum fyrr hava verið tikin innan undirvísingarverkið.

Umframt sjálvan skúlan verður eisini skúla- og býarbókasavn, matarhøll og aula, sum umframt at vera brúkt í skúlahøpi, eisini verður mentanarhúsið, sum ætlanin hevur verið at bygt her í býnum.

– Tá hendan byggingin er liðug, verður møguleikin framúr góður at bjóða okkum fram at hava ymisk tiltøk á mentanarliga økinum. Tað verður seg tónleikur, fyrilestrar, framsýningar ella framførslur av ymiskum slag, segði Hans Jacob.



*Modell av nýggja skúlanum. Har vera 18 stovur, bókasavn og annað. Skúlin verður 4800 m2, og hann fer at kostað um 82 milliónir krónur*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Skúli og mentannarhús**

Articon stendur fyri skúlabyggingini. Teir fingu arbeiðið í kapping við tvær aðrar fyritøkur, sum eisini høvdu bjóðað uppá verkætlanina. Jón Danielsen, stjóri í Articon, bar fram nøkur orð á tiltakinum.

Hans Petur Ellingsgaard, formaður í mentannarnevndini í Runavíkar Kommunu, helt eisini eina røðu á hátíðarhaldinum.

– Øll kenna vit málið. Nógv hevur verið tosað um hetta mál upp gjøgnum árini. Ymiskar hava ætlanirnar verið, men eg haldi, at vit við hesi loysn hava funnið fram til tað bestu loysnina. Allir partar hava sett sítt fingramerki á verkætlina, og tí eru vit ídag komin til eina verkætlan, sum eg haldi eg kann siga, at øll hava kunnað tikið undir við, segði hann.

Hans Petur fegnaðist eisini um, at møguleiki verður fyri at nýta skúlan eftir skúlatíð til onnur tiltøk.

– Eg fegnist eisini um, at mentannarhúsfelagið, sum í fleiri ár hevur arbeitt við eini verkætlan um bygdarhús eisini hevur fingið innivist í hesi verkætlan.

Við hesum samstarvi koma vit ikki bert at fáa ein vælvirkandi skúla men eisini hølir sum eftir vanliga skúlatíð koma at hýsa mentanartiltøkum av alsskinns slag, segði Hans



*Skúlastjórin í Runavíkar skúla fegnast um, at tey fáa nýggjan skúlabygning. Núverandi skipan hevur fleiri veikleikar, viðurkennir hann*

*Mynd: Heini S. Kristiansen*



*Hans Jacob Lamhauge, borgarstjóri í Runavíkar Kommunu, setti spakan í. Longu fimm minuttir eftir at fólk vóru farin inn, byrjaði arbeiðið at grava út*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Skúlin eitt livandi stað

**Skúlastjórin í Runavíkar skúla, Ásmund Lamhauge, er sera fegin um, at tey nú fáa nýggjan skúlabygning. Næmingarnir og umsitingin verða meira miðsavna, og tað verður léttari hjá teimum at lúka millum annað tøkniligu krøvini. Ásmund vónar, at skúlin verður eitt livandi stað, har ið virksemi er allan dag**

SKÚLABYGGING
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Ásmund Lamhauge er skúlastjóri í Runavíkar skúla. Hann fegnast um, at arbeiðið við nýggja skúlanum er farið í gongd.

– Vit bíða í spenningi inntil teir 36 mánaðarnir eru farnir, og vit hava ein nýggjan skúla, sigur Ásmund, sum ásannar, at núverandi skipan ikki er nøktandi:

– Núverandi skipan hevur veikleikar. Skúlabørnini eru á fýra ymiskum plássum. At hava skúla í Rituvík, Søldarfirði, Glyvrum og Runavík er ikki haldbært í longdini. Tað er einans Glyvra skúli, sum hevur eitt bókasavn. Sostatt hava vit eina framhaldsdeild her í Runavíkar skúla, sum einki bókasavn hevur.

**Léttari at lúka krøv**

Krøvini til tøkniliga útgerð verða bara størri og størri, og tey eru torfør at lúka, tá ið skúlaverkið er so desentraliserað.

– Tað verður sera kostnaðarmikið at nøkta tørvin á telduøkinum, um vit skulu hava væl útgjørdar teldustovur í øllum fýra skúlum. Við nýggja skúlanum kunnu vit lúka krøvini, tí at teldan skal vera eitt dagligt amboð hjá næminginum. Vit fáa eisini ein væl útbygdan pedagogiskan depil.

Ásmund veit ikki rættiliga at siga, hvat hinir skúlarnir skulu nýtast til.

– Skúlagongdin í Rituvík verður niðurløgd. Møguliga verður skúlin í Søldarfirði nýttur til sertímar. Men tað veit eg einki ítøkiligt um.

– Við einari meira miðsavnari umsiting spara vit pengar. Vit kunnu nýta arbeiðsorkuna meira effektivt. Tú kanst kalla hetta eina rationalisering, sigur Ásmund.



*Kári P. Højgaard, Hans Jacob Lamhauge og Jón Danielsen stilla upp til æru fyri myndamannin. Fólk vóru í góðum lag til hátíðarhaldið*

*Mynd: Heini S. Kristiansen*

Skúlastjórin vónar, at skúlabygningurin verður nýttur til annað enn skúlagongd.

– Eg vóni, at skúlin verður eitt livandi stað, sum allur býurin er glaður fyri. Vónandi verður virksemi í skúlanum allan dagin. Eg haldi, at ein so flottur og dýrur bygningurin skal nýtast mest møguligt, sigur fegni skúlastjórin at enda.